## Nógvar bøkur

Sjáldsama nógvar føroyskar bøkur eru komnar út nú upp undir jól, og á heimasíðuni hjá Riti og Ráki í SMS ber til at síggja, hvørjar bøkur eru best umtóktar millum fólk. Í síðstu viku var Lætt og Leskiligt 2 tann mest selda, bókin um Júst í Túni var næstmest seld, síðani Skakandi tilburðir, Okkara Sangbók, Jóan Petur hjá Mouritsi, Lívsbardagi á Kappanum, Eydnuloysi, Jørundur, Traðkaðu fólkinum slóð, og nr. 10 var var Jana eitt hjartabarn.

## Veðrið og vegirnir

Norsku vegamyndugleikarnir eru farnir undir at gera sær eina mynd av, hvørjar avleiðingar broytingarnar í veðurlagnum kunnu fáa á vegakervið og ferðsluna. Myndugleikarnir siga, at meiri avfall, meiri hiti og minni frost fara at elva til meiri vatn á vegunum og skriðulop. Tí eru teir nú farnir undir at kanna, um ymsar mannagongdir skulu broytast, tá vegir verða gjørdir í framtíðini, og um viðlíkahaldið eisini skal broytast.

# Bussurin fleyg uttanfyri køksvindeygað

**Trygvi Midjord hvakk við sunnumorgunin, tá hann sat og fekk sær morgundrekka. Hann var júst liðugur, tá hann brádliga hoyrdi nógvan vind, og tá hann hugdi upp feyk bussur hansara upp fyri køksvindeygað**

VINDSKAÐI

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*Trygvi Midjord og bussurin sum fór sendandi eftir vegnum, tó ein hvirla brádliga kom og tók hann*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Hvalba:** Trygvi Midjord býr í uppi í Trøðini í Hvalba. Tað sum verður rópt uppi á Neystabøð. Hann var farin tíðliga upp sunnumorgunin. Klokkan nærkaðist seks, og Trygvi var júst liðugur at eta morgunmat og drekka morgundrekka í køkinum. Hann var á veg út úr køkinum eftir jakkanum, tá hann hoyrir at vindurin vaks øgiliga nógv og øgiliga knappliga.

Trygvi vendir eyguni móti køksvindeyganum og hevur sera ilt við at trúgva tí hann sær. Uttanfyri vindeyga fleyg ein bussur hansara. Í leysari luft.

– Bussurin feyk upp fyri vindeygað. Eg renni so yvir og toyggi meg út í vindeygakarmin, og síggi at gamli bilurin verður lyftur upp um hin lítla bussin og fer sendandi yvireftir, fortelur Trygvi Midjord.

Mini-bussurin tekur í yvirkantin á einum samaslag bussi við síðuna av. Hesin koppar og saman fara bussarnir báðir sendandi einar 15 metrar yvireftir.

### Ongantíð upplivað líknandi

Trygvi Midjord dugir yvirhøvur ikki at siga, hvat tað var sum hendi sunnumorgunin. Hann var farin tíðliga upp og skuldi koyra rutu. Trygva dámar væl at hava góða tíð um morgnarnar, og tað hevði hann eisini henda morgunin.

– Tað rann mær ongantíð í huga, at eg ikki skuldi fara at koyra rutu orsaka av vindinum. Vit plaga eisini altíð at hoyra her, tá ið hvirlurnar koma, men soleiðis var als ikki sunnumorgunin. Hvirlan kom burtur úr púrasta ongum, og hvarv eisini líka knappliga, sigur Trygvi Midjord.

Hann skuldi koyra rutu klokkan 6.10. Tá klokkan var góðar tíggju minuttir í seks, var hann á veg út í gjøgnum dyrnar, men tá var tað at hvirlan kom og tók bussarnar.

– Eg havi koyrt buss í 42 ár, og búð uppi í Trøðini í 30 ár, men aldrin havi eg upplivað nakað líknandi, sigur Trygvi Midjord.

– Hetta er slíkt eg bara havi sæð í sjónvarpinum, sigur Trygvi og flennir so. Trygvi Midjord hevur koyrt buss í 42 ár. Hann eigur tí fleiri bussar, og í túni hansara henda sunnumorgunin stóð ein stórur bussur, ein persónbilur og tveir minibussar. Tað vóru hesir báðir síðst nevndu, sum hvirlan tók.

Tann eini bussurin hevur IRF longu verið eftir, og verður hann nú burturbeindur, og hin bussurin metir Trygvi sjálvur eisini er vrak.

### Kendi seg forfylgdan

Meðan Trygvi stendur í vindeyganum og eygleiðir ruðuleikan uttanfyri, sær hann at hvirlan fer omaneftir móti einum hoyggjhúsið, hann sjálvur eigur. Har blásti hvirlan allar hurðar upp, og síðani hvarv hon líka knappliga sum hon kom.

– Eg føldi meg næstan forfylgdan hesa løtuna, tí hvirlan gjørdi seg bara inn á mítt. Fyrst inn á bussarnar og síðani hoyggjhúsið, áðrenn hon hvarv, sigur Trygvi Mortensen skemtandi.

### Tríggjar metrar upp í loft

Henda morgunin ógvusliga og óvanliga hendingin fór fram, var Trygvi Midjord í køkinum. Húsini hjá Trygva eru í tveimum hæddum, og køkurin er á ovaru hæddini. Bussurin hjá Trygva Midjord varð lyftur upp um alla kjallarahæddina, og upp fyri køksvindeyga hjá Trygva. Her er talan um stívliga tríggjar metrar, ið bussurin hevur lyft seg.

Trygvi Midjord undrast stórliga yvir tað, sum honum var fyri sunnumorgunin, og aðrir hvalbingar undrast eisini. Trygvi hevur heldur onga frágreiðing upp á tað, men sigur hetta minnir hann mest um tað, sum hendi í London herfyri, tá ein melduródn gjørdur um seg. Hon vardi í minni enn ein minutt, men sorlaði frá hond og gjørdi stóran skaða á bæði hús og fólk.

## Hvalba og London

Trygvi Midjord sigur sjálvur, at tilburðurin í Hvalba minti mest um tað, sum hendi í London herfyri, tá ein melduródn kom fullkomiliga burtur úr ongum og gjørdi stóran skaða.

Petur Skeel er veðurfrøðingur og arbeiðir á Sosialinum. Hann sigur, at tað sum hendi í Hvalba sunnumorgunin, helst er nakað tað sama sum hendi í London. Uttan at kenna nærri til tilburðin í Hvalba, so metir hann talan vera um eina minni cyklon, har luftin hevur verið óstøðug og tí koma hvirlur sum hesar. Petur Skeel vísir á, at vit hava havt keðiligt veður í Føroyum seinastu dagarnar, og í London hevði eisini verið keðiligt veður í fleiri dagar, so tí er væl hugsandi, at tað er tað sama sum er hent í bæði Hvalba og London.



*Bussurin kom uppfyri køksvindeyga, og tað er vindeyga ovast til vinstru á húsinum mitt í myndini*

*Mynd: Áki Bertholdsen*